TRYGD

# 20 ár við Trygd og fríari kapping

# 20 years of Trygd and competition

## Innihaldsyvirlit / Contents

Frágreiðing um fyrra hálvár 2018 .......... 2
Eginpeningur og gjaldføri felagsins .......... 3
Útlit fyri seinna hálvár 2018 .......... 3
Grundarlagið undir hálvársfrágreiðingini .......... 4
Aðrar upplýsingar .......... 4
English section .......... 5
Management's report H1 2018 .......... 5
The company's capital structure and solvency .......... 6
Outlook for the remaining of 2018 .......... 7
Basis of preparation of the H1 financial statements .......... 7
Other information .......... 7
Roknskapartøl / Financial Statement .......... 8
Leiðsluátekning .......... 11
Statement by the management .......... 11

P/F Trygd Tryggingarfelag · Oknarvegur 5 · Postboks 44 · FO-110 Tórshavn · 358 100 · www.trygd.fo

TRYGD

## Frágreiðing um fyrra hálvár 2018

Gongdin í fyrra hálvári í 2018 hjá Trygd hevur verið merkt av, at inntøkurnar eru hækkaðar munandi, men einstakir størri skaðar hava eisini havt týðandi ávirkan á úrslitið.

Úrslitið áðrenn skatt var 1,0 mió. kr., og tað er munandi verri enn væntað. Til samanberingar var úrslitið í fyrra hálvári 2017 5,1 mió. kr. áðrenn skatt.

Tryggingartekniska úrslitið var 1,2 mió. kr. í fyrra hálvári samanborið við 4,9 mió. kr. í sama tíðarskeiði í 2017. Tað eru serliga teir stóru einstøku skaðarnir, ið seta sín dám á gongdina.

Í februar 2018 kundi Trygd hátíðarhalda 20 ára dagin fyri endurstovnan felagsins, og at 20 ár vóru liðin, síðani Trygd aftur fór undir at tekna tryggingar, og kapping harvið kom á føroyska tryggingarmarknaðin. Hesi seinastu 20 árini hevur Trygd alsamt lagt seg eftir at menna nýggjar og tíðarhóskandi tryggingar til marknaðin. Nýmennandi ávirkanin hjá Trygd sæst eisini aftur í ár í sambandi við nýggju tryggingina Vistartrygd, sum er ment serliga til privatpersónar, ið leiga egin hús, neyst og íbúðir út til ferðafólk gjøgnum t.d. ferðaskrivstovur, kunningarstovur og Airbnb. Talan er um eina slóðbrótandi trygging, sum er hin einasta av sínum slagi í Føroyum.

Fyrra hálvár var eisini merkt av, at stjórin seinastu nógvu árini, Janus Thomsen, legði frá sær, og Brian Smedemark bleiv nýggjur stjóri. Skiftið var væl skipað og fyrireikað í góðari tíð. Trygd takkar Janusi fyri tíðina og fyri stóra arbeiðið, ið hann hevur gjørt fyri felagið.

Marknaðarparturin hjá Trygd hevur síðani februar 1998 verið støðugt hækkandi, og á privata marknaðinum er Trygd vorðin ein týðandi viðleikari viðvíkjandi trygging til føroysk húski. Trygd hevur seinastu árini eisini gjørt stór framstig, tá ið tað snýr seg um sølu av tryggingum til vinnufyritøkur og stovnar í Føroyum. Lutfalsliga størsti vøksturin í inntøkunum hjá Trygd í fyrra hálvári stavar frá vinnuni og almennum stovnum.

Góða gongdin í føroyska samfelagnum sæst enn einaferð aftur í virkseminum hjá Trygd. Økta sølan av nýggjum bilum og jaliga gongdin á sethúsamarknaðinum hava sína ávirkan á tryggingarinntøkurnar. Tá ið ognirnar gerast fleiri í tali og størri í virði, sæst tað eisini aftur í endurgjøldum í sambandi við skaðar, har sethús og innbúgv eru vorðin rættiliga virðismikil, og har einstakar skaðahendingar sum t.d. eldur tískil kann fáa sera stórar avleiðingar fyri fíggjarligu gongdina hjá Trygd.

Bruttotryggingargjøldini hjá Trygd hava verið støðugt vaksandi seinastu árini. Samanborið við sama tíðarskeið í fjør eru tey hækkað við 7,7 mió. kr. og eru sostatt nú 70,1 mió. kr. í mun til 62,4 mió. kr. fyrra hálvár í 2017.

Útreiðslurnar í sambandi við skaðar eru munandi hægri enn fyrra hálvár í 2017. Hetta er bæði eitt úrslit av, at virksemið hjá Trygd er vaksandi, umframt at einstakir stórir skaðar hava verið, ið hava havt stórar útreiðslur við sær. Skaðaútreiðslurnar vóru 37,9 mió. kr. í fyrra hálvári 2018 samanborið við 29,5 mió. kr. sama tíðarskeið í fjør.

Bruttoskaðaprosentið sigur sína søgu um skaðagongdina, og er 68,1% í fyrru helvt av 2018 samanborið við 66,4% sama tíðarskeið í fjør. Hetta støðið verður mett at vera ov høgt, men kemst av áðurnevndu einstøku stóru skaðahendingunum.

Íløguvirksemið gav 0,2 mió. kr. í halli í fyrra hálvári í 2018 samanborið við 0,1 mió. kr. í avlopi sama tíðarskeið í fjør. Sera lága rentustøðið og varna íløgutilgongdin hjá Trygd ger tað trupult at fáa avkast í einum slíkum marknaði, men hetta er eitt tilvitað val og verður mett at vera nøktandi. Meginparturin av íløgufænum er sett í lánsbrøv við sera góðari flokking, og restin er vanligt innlán. Ongar íløgur verða gjørdar í partabrøv.

Rakstrarkostnaðurin fyri fyrru helvt av 2018 samsvarar við væntanirnar og er á sama støði sum sama tíðarskeið í fjør. Hetta verður mett at vera nøktandi, og tá ið havt verður í huga, at virksemið hjá Trygd er vaksandi, er hetta eitt tekin um, at fyritøkan støðugt gerst effektivari.

Endurtryggingarnar verða gjørdar eftir sama leisti sum undarfarin ár, og skipanin, sum Trygd hevur lagt seg eftir, lagar seg støðugt eftir tilgongdini av kundum og hækkandi virðum.

Skatturin av hálvárliga úrslitinum hjá Trygd fyri 2018 verður roknaður at vera 0,2 mió. kr.

Tilsamans hevur Trygd rentað eginpeningin við 1,1% í fyrru helvt av 2018.

Leiðslan fegnast um góðu gongdina, har 20. árið við Trygd í fríari kapping byrjaði við stórum inntøkuvøkstri. Góða spjaðingin millum ymsar bólkar av tryggingum, umframt millum privatar og vinnuligar kundar, verður eisini mett at vera góð. Stórir einstakir skaðar seta sín dám á úrslitið hjá Trygd fyri fyrra hálvár, men hetta er ein eyðvitaður partur av at reka tryggingarvirksemi. Tað er nærum ógjørligt at meta um, júst nær størri skaðar henda, og fyri Trygd er tað mest avgerandi at kunna hjálpa kundunum skjótt og væl, tá ið skaðin er hendur.

## Eginpeningur og gjaldføri felagsins

Tann 30. juni 2018 var eginognin 74,7 mió. kr. Partapeningin, ið er 40 mió. kr., eigur P/F BankNordik.

Trygd hevur gjøgnum fyrra hálvár 2018 latið inn uppgerðir um individuellan solvens til Tryggingareftirlitið. Uppgerðin um individuellan solvens, ið er neyðugur í sambandi við virksemi felagsins, er munandi lægri enn bókaða eginognin.

Kravið pr. 30.06.2018 var kr. 47,4 mió. kr., meðan bókaða eginognin var kr. 74,7 mió. kr. Hetta vísir, at solvensurin er lutfalsliga góður og er á einum støði, ið leiðslan er nøgd við.

## Útlit fyri seinna hálvár 2018

Leiðslan væntar, at inntøkurnar fara at hækka nakað meira í seinnu helvt av 2018, umframt at einstøku stóru skaðarnir ikki endurtaka seg, men at skaðaútreiðslurnar koma í eina meiri vanliga legu, tað ið eftir er av árinum.

Kappingin millum tryggingarfeløgini er hørð og fer uttan iva at halda fram í seinna hálvári. Felagið væntar, at ársúrslitið eftir skatt verður millum 4-6 mió. kr., um skaðaprosentið sum væntað kemur niður á eitt meira vanligt støði í seinna hálvári.

## Grundarlagið undir hálvársfrágreiðingini

Roknskapurin er gjørdur sambært kunngerð nr. 2 frá 30. desember 2009 um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og haldfelagsskapum.

Nýtti roknskaparhátturin, ið varð lýstur undir brotinum um roknskaparhættir í ársfrágreiðingini fyri 2017, er óbroyttur.

## Aðrar upplýsingar

Ongar hendingar eru farnar fram síðan 30. juni 2018, sum hava avgerandi ávirkan á rakstur og fíggjarligu støðu felagsins.

## English section

## Management's report H1 2018

Developments in the first half of 2018 for Trygd have been affected by a significant increase in income, however, the effects of single large-scale damage claims have been significant on the result.

Trygd reported a pre-tax profit of DKK 1.0m, which is significantly lower than expected. The H1 2017 pre-tax result was DKK 5.1m.

The technical result was DKK 1.2m in H1 2018 compared to DKK 4.9m in the same period in 2017. The large-scale single damage claims have a particular influence on this development.

Trygd celebrated its 20th anniversary in February of 2018. This means that 20 years have passed since Trygd was re-established and competition returned to the Faroese insurance market. Since that day, Trygd has been responsible for developing new products for the market. Trygd's innovative strength is also visible this year with the new product Vistartrygd. This is an insurance policy for the many private individuals who rent out their own houses, boathouses and flats to tourists through tourist information centres around the country and not least through Airbnb. This is a ground-breaking insurance policy and the only one of its kind in the Faroe Islands.

The first half of 2018 has also been influenced by the departure of long-time CEO Janus Thomsen, and the appointment of Brian Smedemark to the post of CEO. The transfer of leadership was timely prepared and organised. Trygd thanks Janus Thomsen for his time and the effort he has placed in the company.

Trygd's market share has been steadily increasing since February of 1998 and in the retail market, Trygd is an important part of the insurance landscape for Faroese households. These last few years Trygd has increased its market shares in the corporate and institutional sectors significantly, and the relatively largest part of Trygd's income increase comes from corporate/institutional sectors.

The positive developments in Faroese society also have a positive effect on Trygd's figures this year. More and newer cars, in addition to the positive developments on the housing market have had their effects on the insurance income. However, the developments in increasing values also affects the damage claims because houses and inventory have become very costly and single events such as fires may affect Trygd's financial developments significantly.

Gross premium income have been steadily increasing these last years and have now increased by DKK 7.7m compared to DKK 62.4m in H1 2017.

Claims expenses are significantly higher in H1 2018 than in the same period in the previous year. This is caused by Trygd's increasing activities as well as a number of large-scale single damage claims that have been very costly. Claims expenses are DKK 37.9m in H1 2018 compared to DKK 29.5m in the same period in 2017.

Claims ratio indicates the developments in claims. The H1 2018 claims ratio is 68.1% compared to 66.4% in H1 2017. This is considered too high and is affected by large-scale single events.

Financial income amounted to a deficit of DKK 0.2m in H1 2018 compared to a profit of DKK 0.1m in the same period in 2017. The low interest and the very cautious developments in Trygd's investments entails that it is difficult to achieve a profit in such a market, however this is an active choice and it is deemed satisfactory. The majority of the investment budget has been placed in high rated bonds and the rest in standard deposits. No investments have been made in shares.

Operating expenses for the first half of 2018 have remained on the expected level and remain the same as in the same period in 2017. This is deemed to be on an acceptable level considering Trygd's increasing activities. This is a sign that the company is becoming more efficient.

Reinsurance remains in the same program as the previous year and the program that Trygd has implemented is continually adapting to the increase in customers and increasing value.

Tax on the income for the first half of 2018 has been calculated at DKK 0.2m.

Overall, Trygd generated a return on equity of 1.1% in H1 2018.

The management is satisfied with the development of the company, where the 20$^{th}$ year in the company's history takes off with an increase in income, and that the spread between the various groups of insurance and between retail and corporate customers is deemed satisfactory. Large-scale single claims affect Trygd's H1 result, however, this is part of the business of being an insurance company, and it is difficult to anticipate when such damage claims will occur, however, Trygd is ready to help its customers when problems arise.

## The company's capital structure and solvency

Shareholders' equity amounted to DKK 74.7m at 30 June 2018

The share capital of DKK 40m is wholly owned by P/F BankNordik

Trygd has through the course of 2018 submitted statements of individual solvency to the Insurance Authority of the Faroe Islands. The calculated individual solvency required for the company's current operations is substantially lower that the company's shareholder's equity.

The requirement on 30 June 2018 was DKK 47.4m while the company's shareholders' equity was DKK 74.7m.

This confirms the company's relatively strong financial position, of which the management is satisfied.

## Outlook for the remaining of 2018

Management anticipates a further increase in revenue flows in the second half of 2018, and it does not expect a repetition of the large-scale individual damages, but a return to a normal level of damage claims expenses for the remainder of the year.

The competition between the insurance companies remains fierce and is expected to continue for the rest of the year.

Trygd expects the full-year net profit to be around DKK 4-6m, if the claims ratio returns to a normal level in the remainder of the year.

## Basis of preparation of the H1 financial statements

The interim financial statements have been prepared in accordance with Executive Order No. 2 of 30 December 2009 on financial reports presented by insurance companies.

The accounting policies applied are set out in in the section on accounting policy in the Annual Report 2017 and are unchanged

## Other information

No events have occurred since 30 June 2018, which are of material significance to the company's financial or operating position.

TRYGD

# Roknskapartøl / Financial Statement

## Gongdin seinastu 5 árini / 5-year financial highlights

| Høvuðstøl / key figures<br>DKK 1.000 | 30.06.2018 | 30.06.2017 | 30.06.2016 | 30.06.2015 | 30.06.2014 | 31.12.2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tryggingargjøld, brutto / Gross premiums written | 56.351 | 50.028 | 45.688 | 44.169 | 41.936 | 103.407 |
| Bruttoskaðaendurgjøld / Gross insurance claims | -38.372 | -33.219 | -21.781 | -30.787 | -27.792 | -61.063 |
| Rakstrarútreiðslur av trygging / Total insurance operating expenses | -12.483 | -11.978 | -10.428 | -9.642 | -9.116 | -24.413 |
| Tryggingarteknisk renta f.e.r. / Technical interest, net of reinsurance | -213 | -103 | -68 | -95 | 80 | -424 |
| Úrslit av endurtrygging / Profit/loss on business ceded | -4.074 | 196 | -3.098 | -2.665 | -2.673 | -3.080 |
| **Tryggingarteknisk úrslit / Technical result** | **1.210** | **4.923** | **10.312** | **980** | **2.435** | **14.427** |
| Íløguavkast eftir trygg. tekniska rentu / Investment yield after tech. interest rate income | -199 | 133 | 807 | -342 | 2.212 | -221 |
| **Úrslit / Net profit** | **828** | **4.146** | **9.118** | **523** | **3.783** | **12.012** |
| Úrslit av endurgjaldsavsetingum fyri egna rokning / Run-off result from net claims provisions | 1.215 | 2.848 | 6.304 | 2.545 | 2.138 | 4.575 |
| **Fíggjarstøða / Balance sheet** | | | | | | |
| Tryggingartekniskar avseting tilsamans / Technical provisions total | 97.360 | 94.048 | 72.856 | 77.185 | 77.087 | 79.504 |
| Tryggingaráogn tilsamans / Total Technical assets | 3.888 | 13.277 | 846 | 512 | 1.151 | 6.383 |
| Eginogn tilsamans / Total Equity | 74.748 | 72.054 | 76.762 | 63.683 | 79.422 | 79.920 |
| Áogn tilsamans / Total Assets | 181.079 | 174.085 | 160.437 | 158.543 | 174.790 | 168.031 |
| **Lyklatøl / Ratios** | | | | | | |
| Bruttoendurgjaldsprosent / Claim ratio | 68,1 | 66,4 | 47,7 | 69,7 | 66,3 | 59,1 |
| Bruttokostnaðarprosent / Gross expense ratio | 22,2 | 23,9 | 22,8 | 21,8 | 21,7 | 23,6 |
| Endurtryggingar %, netto / Net reinsurance ratio | 7,2 | -0,4 | 6,8 | 6,0 | 6,4 | 3,0 |
| Combined Ratio / Combined Ratio | 97,5 | 90,0 | 77,3 | 97,6 | 94,4 | 85,6 |
| Operating Ratio / Operating Ratio | 98,2 | 90,3 | 77,5 | 97,8 | 94,2 | 86,0 |
| Lutfalsligt úrslit av endurgjaldsavsetingum / Relative Run-off gains/losses | 2,8 | 3,9 | 12,5 | 6,7 | 0,8 | 10,2 |
| Eginognsavkast í % / Return on Equity, % | 1,1 | 5,9 | 12,6 | 0,8 | 4,9 | 16,3 |
| Solvensdekning / Solvency Coverage | 2,7 | 2,9 | 2,9 | 2,4 | 3,0 | 2,8 |

TRYGD

## Rakstrarúrslit / Income statement

| DKK 1.000 | 30.06.2018 | 30.06.2017 |
|---|---|---|
| Tryggingargjøld, brutto / Gross premiums written | 70.136 | 62.406 |
| Latin endurtryggingargjøld / Ceded insurance premiums | -5.404 | -4.524 |
| Broyting í avsetingum til tryggingargjøld / Change in gross provisions for unearned premiums | -13.784 | -12.379 |
| Broyting í endurtryggingarparti av avsetingum til tryggingargjøld / Change in reinsurers' share of provisions for unearned premiums | 477 | 630 |
| **Tryggingargjøld f.e.r. / Earned premiums, net of reinsurance** | **51.424** | **46.133** |
| | | |
| **Tryggingarteknisk renta f.e.r. / Technical interest, net of reinsurance** | **-213** | **-103** |
| | | |
| Útgoldin skaðagjøld, brutto / Claims paid | -33.503 | -56.164 |
| Endurgoldið frá endurtryggingingini / Reinsurance recoveries | 2.615 | 16.555 |
| Broyting í avsetingum til skaðagjøld / Change in gross provisions for claims | -4.869 | 22.944 |
| Broyting í endurtryggingarparti av avsetingum til skaðagjøld / Change in reinsurers' share of gross provisions for claims | -2.175 | -12.833 |
| **Skaðagjøld f.e.r. / Claims incurred, net of reinsurance** | **-37.932** | **-29.498** |
| | | |
| Fyrisitingarútreiðslur / Administrative expenses | -3.802 | -3.663 |
| Tekningarútreiðslur / Acquisition costs | -8.681 | -8.315 |
| Provisiónir frá endurtryggingum / Commission from reinsurers | 413 | 369 |
| **Rakstrarútreiðslur av trygging f.e.r / Total insurance operating expenses, net of reinsurance** | **-12.070** | **-11.609** |
| | | |
| **Tryggingartekniskt úrslit / Technical result** | **1.210** | **4.923** |
| | | |
| Inntøkur av fastari ogn / Income from real property | -16 | -54 |
| Rentur og vinningsbýti v.m. / Interest and dividends, etc. | 495 | 642 |
| Virðisjavnan av íløguognum / Value adjustments of investment assets | -892 | -557 |
| **Inntøkur av íløguognum / Income from investment assets** | **-413** | **30** |
| | | |
| **Flutt til tryggingartekniska rentu / Transferred to technical interest** | **213** | **103** |
| | | |
| **Úrslit av íløguvirksemi / Return on investment activities** | **-199** | **133** |
| | | |
| **Úrslit undan skatti / Profit before tax** | **1.011** | **5.057** |
| | | |
| **Skattir / Tax** | **-183** | **-910** |
| | | |
| **Hálvársúrslit / Profit for the year** | **828** | **4.146** |

## Fíggjarstøða / Balance sheet

| DKK 1.000 | 30.06.2018 | 30.06.2017 |
|---|---|---|
| **Ogn / Assets** | | |
| Rakstrargøgn | 831 | 274 |
| Bygningar / Real property | 1.954 | 1.974 |
| **Materiell ogn í alt** | **2.785** | **2.248** |
| | | |
| Lánsbrøv / Bonds | 154.990 | 127.429 |
| **Íløguognir í alt/ Investment assets** | **154.990** | **127.429** |
| | | |
| Endurtryggjaranna partur av avsettum tryggingargjøldum | 477 | 630 |
| Endurtryggjaranna partur av avsetingum til endurgjøld | 3.410 | 12.647 |
| **Endurtryggjaranna partur av avsetingum til tryggingaravtalur í alt** | **3.888** | **13.277** |
| | | |
| Áogn hjá tryggingartakarum / Receivables from policyholders | 3.538 | 3.583 |
| Áogn hjá tryggingarfeløgum / Receivables from insurance companies | 33 | 5.428 |
| **Áogn í alt / Receivables** | **3.571** | **9.011** |
| | | |
| Útsett skattaogn | 21 | 50 |
| Tøkur peningur | 14.075 | 20.409 |
| **Aðrar ognir í alt/ Other assets** | **14.096** | **20.459** |
| | | |
| Rentur tilgóðar | 451 | 497 |
| Aðrar tíðarmarkinger | 1.300 | 1.165 |
| **Tíðaravmarkingar í alt/ Prepayments** | **1.751** | **1.662** |
| | | |
| **Ognir tilsamans / Total assets** | **181.079** | **174.085** |

| DKK 1.000 | 30.06.2018 | 30.06.2017 |
|---|---|---|
| **Skuld / Equity and liabilities** | | |
| Partapeningur / Share capital | 40.000 | 40.000 |
| Framflutt úrslit / Retained earnings | 34.748 | 32.054 |
| **Eginpeningur / Equity** | **74.748** | **72.054** |
| | | |
| Avsett til tryggingargjøld / Gross provisions for unearned premiums | 49.809 | 44.314 |
| Avsett til endurgjøld / Gross provisions for claims | 47.551 | 49.733 |
| **Tryggingartekniskar avsetingar í alt** | **97.360** | **94.048** |
| | | |
| **Skuld** | | |
| Skuld í samband við endurtrygging / Debt related to reinsurance | 117 | 20 |
| Skattur / Tax | 2.799 | 984 |
| Onnur skuld / Other payables | 5.297 | 6.753 |
| **Skuld / Total debt** | **8.212** | **7.757** |
| | | |
| **Tíðaravmarkingar / Accruals and deferred income** | **759** | **227** |
| | | |
| **Skuld tilsamans / Total equity and liabilities** | **181.079** | **174.085** |

TRYGD

## Leiðsluátekning

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og góðtikið hálvársfrágreiðingina hjá P/F Trygd fyri tíðarskeiðið 1. januar – 30. juni 2018.

Hálvársfrágreiðingin er gjørd bæði sambært kunngerð nr. 2 frá 30. desembur 2009 um fíggjarligar frágreiðingar hjá tryggingarfeløgum og sambært viðtøkum felagsins.

Vit halda, at menningin í virkseminum og fíggjarligu viðurskiftini í P/F Trygd eru rætt eftirkannað í leiðslufrágreiðingini, og at týðandi váðar og óvissutættir, sum kunnu raka felagið, verða lýstir.

Vit halda, at tann nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at roknskaparligu metingarnar eru álítandi.

Vit halda eisini, at øll framløgan av hálvársfrágreiðingini vísir røttu støðuna. Okkara fatan er at hálvársfrágreiðingin gevur eina rættvísandi mynd av ogn, skuld, og úrslitinum av virksemi og peningarensli í P/F Trygd.

Tað er ikki framd grannskoðan ella review av hálvársfrágreiðingini.

Tórshavn, 31. august 2018

## Statement by the management

The Board of Directors and the Management Board have today considered and approved the interim report of P/F Trygd for the six months ended 30 June 2018.

The interim financial statements have been prepared in accordance with Executive Order No. 2 of 30 December 2009 on financial reports presented by insurance companies and with the company's articles of association.

In our opinion, the management's report includes a fair review of the developments and performance of the activities and financial position of P/F Trygd and describes significant risks and elements of uncertainty that it faces.

We consider the accounting policies applied to be appropriate and the accounting estimates to be reasonable.

Furthermore, we find the overall interim report presentation true and fair. In our opinion, the interim report gives a true and fair view of P/F Trygd's assets, liabilities, results of operations and cash flows.

The interim report has been neither reviewed nor audited.

Tórshavn, 31 August 2018

**Stjórn / Executive Board**

Brian Smedemark

**Nevnd / Board of Directors**

Turið Finnbogadóttir Arge
*Forkvinna / Chairwoman*

Árni Ellefsen

Rune Nørregaard

Christian Clemmensen